**VIÐMERKINGAR**

# Nú er nóg mikið

Viberg Sørensen



Í útvarpinum í gjárkvøldið fingu vit tey tíðindi servera afturvið nátturanum at norska Statoil ikki metir at Norserv á Tvøroyri er vert at taka við tá tað snýr seg um at veita tænastur til oljuvinnuna.

Tað mundi koma mongum suðringi dátt við, at vit ikki so frætt sum sleppa at bjóða uppá hesar tænastur. Vit hava havt ein mistanka um at vit kanska blivu sáldaðir frá uppá onkran snildan hátt, men at tað skuldi verða so karrátt vardi okkum ikki.

Statoil ómakaði sær suður her, nú fyri kortum, og brúkti heilar 4 tímar her suðri, sig so at teir ikki hava kannað Suðuroynna.

Vit vita væl at hetta er avtala spæl fyri langari tíð síðan, tað skuldi bara verið sagt av okkara landsmonnum, tað er ómansligt at lata útlendingar gera tað skitna abeiðið.

Samstarvs partnari okkara í Danmark, felagið A.P. Møller verður í altjóða høpi mett sum eitt tað mest seriøsa felagið sum fæst við oljuvinnu. Hetta felag kenna vit allir føroyingar, øll kenna vit fleiri sum eru í vinnu hjá hesum felag. Tað felags eyðkenni sum allir hesir føroyingar geva felagnum er at betri arbeiðspláss er ikki til. Her verður dugnaskapur virdur og úrslitini eru eisini hareftir. Hetta felag hevðI ikki kunna verið eitt av heimsini størstu reiðaríðum uttan eina sera dugnaliga leiðslu.

Tá hetta felag sum hevur »rettidig omhu« í skjaldramerkinum hevur kannað Drelnes og mett at hetta plássið er sera væl egnað sum veitingarstøð til oljuvinnuna er tað skelkandi at ikki so frætt at verða boðIð við.

Nú hendir so tað, at eitt norskt felag ikki vil sleppa okkum suðringum saman við okkara danska samstarvspartnara at bjóða uppá nakað sum helst í oljuvinnuni.

Norðmenn eiga ein stóran part av okkara nýggju skipum, alivinnan er so gott sum øll norsk og nú sær út til at einasta fiska-mjølsvirkið eisini verður norskt. Hesar umstøður eiga at geva mongum manni gásahold, tí so frætt kenna vit grannan.

Danskarar eru góðir nokk tá ið tað ræður um at senda okkum blokkin, heilsuverið hja teimum er óført, og so øll útbúgvingartilboðini og mangt annað, men tá tað nú kanska eru pengar í luftini tá lata vit norðmenn avgera saman við teirra føroysku leigusveinum.

Løgting Føroya hevur samtykt, at oljuvinnan skal sjálv avgera hvar virksemi skal verða. Tá hetta var samtykt vóru vit ikki so fáir sum klárt ávaraðu ímóti hesum at tað blivu útlendingar sum avgera hvussu og hvar vit vilja hava tingini plaseraði. Tað er júst tað sum nú ferð at henda.

Vit stríðast í løtuni við at fáa fullveldi, hetta her væl saktans í sær at vit ætla sjálvir at taka avgerðirnar og gera av hvussu land okkara skal síggja út. Hetta er at fegnast um, men skal hetta verða andin, at partar av landinum skulu offrast á einum mammons altari, kundi tað hent at mangur maður setist aftur. Í hvussu er her suðuri, føla vit ófrætta vindar blása norðaneftir.

Uppgávan hjá Løgtinginum er at stýra hesum landinum soleiðis at øllum føroyingum verða so eins kor sum møguligt at liva undir. Hetta er sera sera álvarsligt og vónandi eru teir uppgávuna vaksnir sum nú skulu seta tingini uppá pláss.

Tað er lætt at tosað um útjaðarapolitikk, vísi okkum nú, at tað ikki bara eru orð. Eitt skal so sláast fast: suðringar fara ikki at sita og hyggja at, meðan hesin oyðingar politikkur ferð fram.

---

# Skommin

Marjun Nielsen

Brimil má fáa navnabroyting til Føroya skomm. Endiliga vóru vit komin so langt, at vit fáa eitt skip, sum vit sjálvi hava latið byggja og so endaði tað í lønarstríð. Eg veit so ikki hvat hesir yvirmenn hava í løn, um teir so eru fjúrtan dagar umborð hvønn mánað, so hava teir eitt stórt ansvar. Tað krevur sín mann.

Tað undarliga er, at tað mangla ikki pengar, tá fólk skal setast í starv á landi. Akkurát nú kunngerð løgmaður hvat lønin skal vera hjá borg-meistarum og kommunustýrislimum. Vit sóu eisini, hvussu Finnbogi setti lønirnar hjá teimum sjálvum upp í topp, kunna summi siga, so skuldi eingin hava eyka arbeiði. Tað bleiv eitt rama skríggj, tí hesir góðu menn kundu saktans klára tvey størv.

Umsitingin í okkara landi er so stór, at vit øtast. Rætt skal vera rætt, tað er komið nakað av skafti hesa tingsetu, vit fáa tvey onnur spildurnýggj strandaskip og tað er at gleðast um.

Farið nú til samráðingarborðið, Brimil hevur til uppgávu at verja okkara dýrastu ogn og at hjálpa neyðstøddum sjómonnum. Latið yvirmenninar fáa ta løn, sum er hóskandi fyri eitt so týdningarmikið starv.

---

# Stríð um samkynt paralag

Ólavur í Mittúni

Um nú drúgv tíð er liðin síðan tað hendi, verið eg ofta spurdur um hvat tað var, sum veruliga hendi í Klaksvík í samband við at biskoppurin Hans J. Joensen hevði boðið norðurlendsku biskoppunum higar at vitja í samband við 1000 ára haldið. Og líka ofta verður spurt: »Hvat er tað, sum verður hátíðarhildið?«

Tað sum hendi í Klaksvík var at ein stórur meiriluti av meinigheitsráðnum 6 av 8 heittu á prestarnar, um at siga biskoppinum, at vit ikki mettu tað rætt at vera, at Karsten Nissen prædikaði í Klaksvík, tí hann hevði tikið støðu saman við hinum donskum bispunum í spurninginum um signan av homuseksuellum paralag. MeinigheitsráðIð hevði jú alment takkað biskoppinum Hans J. Joensen fyri støðutakan hansara á biskoppafundinumm, sum viðgjørdi spurningin um signan av homoseksuellum paralag, har hann sum tann einasti ikki vildi vera við.

Í fyrstu atløgu segðI biskoppurin Hans J. Joensen tað at vera í lagi, tí sum hann sjálvur málbar seg: »Hetta var bert eitt tilboð. Sakin átti nú at verið avgjørd.«

Men so var ikki. 15 prestar skriva nú eina umbering fyri okkara prestar til donsku bisparnar. Tílík niðurgerðan av medmenniskjanum átti at verið einum og hvørjum menniskja, tíðansheldur presti, fjart í huga. Nú er laga manni hjá pressuni, og bæðI útvarp, sjónvarp og bløðini fingu teirra søgur. Tí meirilutin ræður o.s.fr. Eisini hin myrka dagin tá Ið kirkjunnar harri doyðI einsamallur fyri hinar mongu.

Hendan prestaútmeldanin gjørdist seinri til eina nýggja prestaútmelding. Nú eru tað 10 eftir sum royna at siga fólkinum: »Vit meina ikki tað, sum vit meina«. Ivaleyst hevur onkur tala at presti teirra. Tó er eingin almenn umbering komin til prestar okkara.

Eftir fyrru prestaútsøgnina fara fólk í Klaksvík við Ásbirni Lómaklett skúlastjóra og fyrrvcrandi dekni á odda at savna inn undirskriftir mótmælandi avgerð kirkjuráðsins og prestanna um at siga nei takk til at bispurin Karsten Nissen prædikaði í Klaksvík. Ásbjørn átti um ikki sum skúlastjóri so sum fyrrverandi deknur at vita hvat bíblian (kirkjan) segðI um samlív millum mann og konu. Var hetta honum ein ivaspurningur og hann eitt mannfólk, átti hann sjálvandi at tosa við prestarnar og fingið eina avklaring hesum viðvíkjandi.

Men so var ikki, heldur var tikið til øsingar háttin, hendan ið hevur ikki bert einaferð, heldur ótaldar ferðir í søgu mannaættarinnar havt so nógva fólkaforføring við sær. At eydnan var við Ásbirni og biskoppinum í so máta fekk eg vátta fyri nú um dagarnar av ungum manni sum segðI seg at hava skrivað undir Ásbirnarskrivi, og grundgav hann við hesum: »At Niels Pauli skuldi ikki nokta hesum danska bispi at tosa í Klaksvík. Tá Ið eg so segðI honum hví við I meinigheitsráðnum høvdu handla so sum vit gjørdu, og at tað vóru vit, Ið høvdu heitt á prestar okkara um at siga bispi, at vit ikki mettu tað rætt at vera, at Karsten Nissen tosaðI í kirkju okkara 2 hvítusunnudag, tí hesin saman við hinum donsku bispunum hevðI sagt gott fyri uppskotinum um at kirkjan átti at signa homuseksuelt paralag. Tá tók hesin ungi maður heldur grovan til orðanna, og gav til kennar at hann so dyggiliga var tikin við nøsini.

Ásbjørn Lómaklett fekk sín vilja og vilja bispsins saman við teimum 15–10 prestunum førdan út í lívið, Karsten Nissen tosaði.

Eitt av fólkinum lógligt valt meinigheitsráð, var avsett. Tveir prestar lógligt kallaðir og innsettir til trúskap mótvegis Guðs orði. Hetta, so løgi tað í dag ljóðar, leggur bispur teimum eina við í innsetanarorðunum, eisini avsettir. Organistur, hjálparorganistur, klokkari og hjálparklokkari hesir við drúgvari og trúgvari tænastu valdu eisini hendan sorgardag at siga nei til urgu og klokku, hetta eiga teir stóra tøkk uppiborna fyri, her kom sannur trúskapur og trúfesti til sjóndar.

Eisini eigur kirkjunar forlongdi armur Emmaus, KFUM&K, og Soli Deo Goloria takk fyri støðutakan teirra.

Annars kundi eg hugsa mær at Asbjørn Lómaklett ikki vildi verið fegin um nú klaksvíkingar fóru at nýta hansara fyrimynd – Gadens Parlament– til tess at fáa teirra vilja framdan í skúlunum.

Vit søgdu nei, fyri at markera at vit ikki mettu tað rætt at vera, tað sum nú ein av teimum donsku bispunum hann sum skuldi tosa í Vesturkirkjuni men sum vegna frásøgn prestsins endaði í Vági–Jan Lindhart – alment hevur lagt navn til.

Vit lesa í danska blaðnum »Ude og Hjemme« nr. 41.11. oktober 2000, undir yvirskriftini »Lesbisk lykke i præstegården«, um danskt par, sum Jan Lindhart hevur vælsignað.

Er tað hendan kirkjan Asbjørn Lómaklett skúlastjóri, Hans J. Joensen bispur saman við teimum 15-10 prestunum vilja gera til tjóðarkirkju okkara, er bert at siga sannleikan fyri fólkinum, og siga fólkinum at hetta er í trá við bíbliunnar sonnu læru um samlív millum kynini og at vit tí hava skyldu til at taka ímóti teimum, Ið føra hesa læru.

Eg eri sannførdur um at hesi kirkju er sannleikin útihýstur.